


*Nr. 17* *18. august 2019* *79. árg.*

# Um hvussu alt endar

*„Teir skulu síggja ásjón Hansara...*
*og teir skulu vera kongar í aldur og allar ævir.“*
*Opb. 22,4-5 V.D.*

Fyri at vita, hvussu ein søga endar, mugu vit lesa síðsta kapitlið. Og í Opinberingini kap. 22 – sum er síðsta kapitlið í Bíbliuni – lesa vit um framtíðarútlitini, sum fara at gleða øll Guds frelstu børn. Latið okkum hyggja at teimum:

**1)** „Tey skulu síggja ásjón (andlit) Hansara.“ Ein av himmalsins størstu gleðum fer at verða, tá ið vit síggja andlitini á okkara kæru, sum vit nú eru skild frá og at liva ævinleikan saman við teimum. Men hvussu spennandi tað enn fer at verða, kann tað ikki samanberast við gleðina at síggja Jesus andlit til andlits – at síggja hann, vit elska mest av øllum. Sangskrivarin segði: „Ásjón hans eg skjótt skal síggja omanfyri stjørnurnar. Andlit tá til andlit skoða Hann í allar ævirnar.“ Og tað er ikki alt. Les hetta: „... vit eru Guds børn, og tað er ikki enn opinberað, hvat vit skulu verða. Vit vita, at tá ið hann verður opinberaður, tá skulu vit verða honum lík, tí at vit skulu síggja hann, sum hann er.“ (1. Jóh. 3,2). Vit skulu síggja hann, vit skulu blíva sum hann, og vit skulu vera saman við honum um ævir. Sum tað er undurfult!

**2)** „Tey skulu vera kongar í aldur og allar ævir.“ Eins og tað endaliga prógvið úr fólkaskúlanum, gjørdi teg skikkaðan at fara undir eina útbúgving og fara út í lívið, soleiðis gera royndirnar í hesum lívi teg skikkaðan at ráða saman við Kristusi í næsta lívinum. Hugsa enn eina ferð um lønina. Hetta lívið er ein stutt

søga, tað næsta lívið er ein long søga – hon er um, at vit síggja Jesus andlit til andlits og ráða saman við honum um ævir.

„... et Ord til Dagen“
*Effie Campbell* umsetti.

# Familjan hittist aftur

*„... so skulu vit altíð vera saman við Harranum.“ 1. Tess. 4,17.*

Í bókini og filminum „Himmalin er veruligur (Heaven Is for Real) var Colton Burpo bara fýra ára gamal, tá ið hann kom frá tí við lívinum eftir eina brádliga skurðviðgerð, har blindgørnin mátti takast. Teir komandi mánaðirnar tosaði hann um vitjan sína í himli. Hann greiddi nágreiniliga frá, hvat ið foreldur hansara høvdu gjørt undir skurðviðgerðini og segði søgur um menniskju, hann hevði møtt í himli – menniskju, sum hann ongantíð hevði hitt á jørðini ella fingið at vita um.

Hann segði við mammu sína: „Tað var eitt pinkubarn, sum doyði í búki tínum, ha?“ Foreldur hansara høvdu ongantíð nevnt tann spontana abortin, sum mamman hevði fingið, av tí at hann var ov lítil at skilja tað. Mamma hansara spurdi: „Hvør hevur sagt tær, at eitt pinkubarn doyði í búkinum á mær?“ Hann svaraði: „Tað gjørdi hon, mamma. Hon segði, at hon doyði í búki tínum.“ So legði hann afturat: „Tað er í lagi, mamma. Hon hevur tað gott. Gud tók hana til sín.“

Mamma hansara segði: „Meinar tú ikki, at Jesus tók hana til sín?“ Hann svaraði: „Nei, mamma, tað gjørdi pápi hansara!“ Eyguni á mammuni lýstu, og hon spurdi: „Hvat æt hon? Hvat var navnið á lítlu gentuni?“ Hin fýra ára gamli Colton svaraði: „Hon hevur einki navn. Tit góvu henni einki navn.“

Og hann mintist eitt afturat, sum hann segði, áðrenn hann fór út at spæla: „Ja, hon segði, at hon gleðir seg ómetaligt, til tú og pápi koma til himmals.“

Beint nú er onkur í himli, sum sigur tað sama um teg – sum gleðir seg til dagin, tá ið Guds familja aftur er saman. Skulu vit ikki eisini gleða okkum?

Bíblian sigur: „... so skulu vit altíð vera saman við Harranum. Troystið tí hvør annan við hesum orðum!“ (Vers 17-18).

„... et Ord til Dagen“
*Effie Campbell* umsetti.

# Legg alt í Guds hond

Lívið her á jørð er ikki altíð so lætt. Øll hava vit bæði við- og mótgongd, og veldigir brotasjógvar kunnu skola inn yvir okkum. Tá ið allir vegir tykjast læstir, so skalt tú minnast til, at vegin uppeftir kann eingin læsa fyri tær. Tað besta tú og eg kunnu gera, er at leggja alt í Guds hond og lata tað liggja har og í tolni bíða eftir honum. Elisabeth Mork á Kanal 10 greiddi nettupp frá hesum í einum vitnisburði sínum:

Maður mín tók lívið av sær, og eg sat einsamøll eftir við tveimum smábørnum. Eg fór durk niður í kolkjallaran. Eg visti, at hann hevði teknað eina lívstrygging, men kundi eg fáa hana útgoldna, tá ið hetta vóru umstøðurnar? Treytirnar vóru jú, at okkurt uttanífrá skuldi hava orsakað ólukkuna. Eg visti eisini, at hann hevði spælt nógv um pengar. Mundi hann hava stóra spæliskuld? Fór eg nú at missa hús og heim afturat? Eg setti meg í samband við tryggingina, og teir søgdu, at eg skuldi fáa boð seinni. Tíðin gekk, og eg frætti einki. Tá gjørdi eg tað einasta, sum eg kundi gera, eg fór í bøn til Gud: „Góði Gud, nú mást tú hjálpa mær í Jesu navni, tú sært ta ringu støðuna, vit eru í. Eg veit hvørki út ella inn; men nú leggi eg hetta málið upp í tínar hendur, og so mást tú taka tær av tí, og eg ætli mær als ikki at blanda meg upp í hetta."

Mamma ringdi nakrar ferðir til mín og segði: „Nú mást tú ringja til tryggingina at vita, hvussu støðan er." Men eg svaraði henni: „Nei, tað geri eg ikki, tí eg havi lagt tað í Guds hendur, og eg ætli mær ikki at blanda meg uppí tað, sum hann er í ferð við at gera."

Tað gingu tvey ár, so fekk eg bræv frá tryggingini. Teir søgdu, at nevndin var vorðin samd um at gjalda mær tryggingina **við rentum**, av tí at teir høvdu **drálað** óneyðuga leingi, og eg hevði verið so ómetaliga tolin.

Hugsa tær, um eg hevði fylgt ráðunum hjá mammu, so hevði eg neyvan fingið nakað útgoldið. Tað loysir seg at leggja alt í Guds hond.

*Effie Campbell.*

---

Vit kunnu ikki „studera" okkum til at verða eitt vitni. Tað er nakað, sum kemur innanífrá.

*e.c.* ums.

# Hví kom hann?

*Í fylling tíðarinnar sendi Gud son sín*
*til okkara jørð. (Gal. 4,4).*

**Hví kom Hann?** Tær heilagu Skriftirnar boðaðu nágreiniliga frá komu hansara, og tær somu Skriftirnar siga okkum ORSØKINA til komu hansara.

Fyri tað fyrsta kom hann, so at vit ikki skuldu glatast, men fáa ævigt lív! (Jóh. 3,16). Men tað tykist, at fólk flest ikki brýggja seg um nakað annað lív enn hetta stutta og forgeingiliga jarðarlívið! Ófatiligt. Men fyri teg – tú, sum skríggjar í hjarta tínum eftir onkrum meir: Tað var fyri TEG, hann kom!

Fyri tað næsta: Hann kom fyri at fría út øll tey, sum trælaðu undir deyðaræðslu og ótta. (Hebr. 2,15). Nú eru tað vissuliga fólk, sum tvíhalda um, at tey óttast einki sum helst! Og tað kann tykjast, sum eru hesi sannar hetjur. Men tað hjálpir teimum einki. Heldur tvørturímóti! Men til teirra, sum kenna óttans pínu í sál síni: **Tað var fyri TEG, hann kom!**

Fyri tað triðja og síðsta: Hann kom at gera tað, sum vit sjálv ikki megnaðu! (Róm. 8,3). „Á, eg klári meg stak væl!“ tvíhalda summi so sjálvvís. Men arma sál – hvussu leingi? Tú, sum annars hevur sæð tað – og veruliga plágast av ikki at røkka til: **Hann kom fyri TEG!** Og minst nú til: Jesus ger enn í dag tað, sum hann kom til – sambært sítt æviga Orð!

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað nyttar ikki at spyrja: „Hvar vart tú, Gud?“ Summir spurningar eru okkum ov stórir. Vit mugu bara ásanna okkara vantandi evni at skilja alt. Tað eru eingi einføld svør. „Harrin loysir fyrst leinkjur, síðani gátur,“ sum Skovgaard-Petersen sigur.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 18* *1. september 2019* *79. árg.*

# Guds hyggjuráð móti strongd

*„Kastið alla sorg tykkara á hann, tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum.“ 1. Pæt. 5,7.*

Kennir tú teg strongdan? Ert tú umgirdur av trupulleikum? Um tað er so, vil Gud seta teg í frælsi. Les hesi skriftstøð uttan at skunda tær og undir bøn:

„Eg søki skjól undir skugga veingja tína, til ólukkan er av.“ Sál. 57,2 – „Tú varðst vørn (vernd) hjá tí vesæla (veika) og hjálp hins fátæka í neyð hans; lívd móti regni og skuggi móti hita.“ Jes. 25,4 – „Eg eri við tær og skal varðveita teg allar staðir, hvar ið tú fert ... tí at ikki vil eg fara frá tær, men evna alt tað, sum eg havi lovað tær.“ 1. Mós. 28,15 – „Bústaður er hin ævigi Gud, og her niðri eru hinir ævigu armar.“ 5. Mós 33,27 – „Óttast ikki! Eg eri við tær! Ver ikki mótfallin! Eg eri Gud tín! Eg styrki teg og hjálpi tær og haldi tær uppi við høgru hond rættvísi Mínar!“ Jes. 41,10 V.D. – „Alt at ellisárum eri eg hin sami; eg beri tykkum, til hárini á tykkum grána; eg lyfti og fari undir tykkum, eg beri og bjargi tykkum.“ Jes. 46,4.

Her er altso Guds uppskrift uppá at linna strongd: Tú skalt líta á, at Gud trúfastur tekur sær av tær. Tak eina tilætlaða avgerð, at tú vilt kasta alla sorg og allan trega yvir á hann. Bið Gud geva tær vísdóm at broyta tína tíðarætlan, um tú ert ovbyrjaður. Gev honum teir trupulleikar, sum tú stendur yvirfyri, um teir eru ov stórir at basa einsamallur – og tak teir ikki við tær aftur. Lat Gud hugsa sínar tankar ígjøgnum teg, og

gev hansara friði, styrki og toli loyvi at broyta títt sinni. Ven teg at gera hetta frá morgunstundini av og so ofta, sum tær tørvar tað gjøgnum dagin.

Hetta eru Guds hyggjuráð móti strongd!

„... et Ord til Dagen“
*Effie Campbell* umsetti.

# Tú mást skilja, hvør ið Gud er

*Rune Edvardsen*

Tú mást skilja, hvør ið Gud er. Hann er nógv meira enn faðir, bróðir ella vinur. Hann er Skaparin sjálvur! Hann skapaði lívið og øll atomir og mýl. Har, sum myrkur var, skapaði Hann ljós. Har einki var, skapaði Hann alt. Síðani heldur Hann ØLLUM uppi. Mitt í øllum hesum stóra og undurfulla hugsaði Hann um teg. Hann legði teg inn í sína skapanarætlan, so at Hann kundi hava felagsskap við teg. Á tann Gud!

Hann hevur alla makt í himli og á jørð. Umframt at skapa stjørnubreytina, sum vit eru ein partur av, skapaði Hann himmal og hav, sáttargerð og rættvísgerning. Tá ið Hann skapaði fyrigeving, byrjaði ein nýggjur morgun í søgu menniskjans.

Menniskjuni blivu skapt við TEIMUM møguleikunum. Hann skapaði vit og skil og hugskotsmenning. Við heila og hondum kundu vit byggja og skapa tøknifrøði til at ferðast á vatninum og í luftini. Vit raktu við bylgjur til útvarps- og sjónvarpssignal. Vit eru komin langt innan heilivág og gransking.

Gud vísti gjøgnum Jesus, at Hann var mentur at sigra á deyðanum. Synd bleiv til fyrigeving. Skeivt til rætt. Soleiðis gjørdi hin almáttugi Gud og Skapari sátt millum seg og heimin – gjøgnum Jesus Kristus. Jesus er hin einasti, sum hevur makt at strika syndir.

Í Markus 1,17 lesa vit, at hesin Gud segði: „Fylgið mær!“

Hann, sum skelkaði teir, tí Hann kom gangandi eftir vatninum, segði eisini:

Sí, eg geri allar lutir nýggjar! *Opb. 21,5.*

Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur. *Jóh. 6,37.*

Øll tey, sum taka ímóti mær, verða børn míni! *Jóhs. 1,12.*

Leggið hendurnar á sjúk! *Mark. 16,18.*

Biðið, og tykkum skal verða givið. *Matt. 7,7.*

Gevið, tá skal tykkum verða givið! *Luk. 6,38.*

Æra faðir tín og móður tína! *2. Mós 20,12.*

Tað er fullgjørt! *Jóh. 19,30.*

Tú mást skilja, hvør ið Gud er. Hetta er tann Gud, sum býr í okkum og livir í okkum.

Ver tí reystur og hugdjarvur. Guds ríki býr í tær og mær. Heimurin skal verða frelstur!

Tað skal Hann syrgja fyri ... eisini við hjálp frá tær og mær!

*Effie Campbell* umsetti.

# Í dag klokkan trý

*Dr. Kurt E. Koch, Doktari í teologi*

Eg havi nakrar ferðir sagt frá einari hending, sum fór fram í Russlandi eftir kríggið.

Martin, ein drongur, sum hevði sínar røtur í Ravensburg-vekingini, var í einari legu uppi við Íshavið. Teir týsku fangarnir gróvu eina veit út til Íshavið. Teir diddaraku kropparnir doyðu í túsundatali í hungri, vesaldómi og kulda. Martin fall ikki í fátt. Hann uggaði vinmenn sínar við orðum úr Nýggja Testamenti, sum hann hevði smuglað inn við sær, og hann bað eisini saman við teimum. Hann var vónarinnar rødd í vónloysinum og hópandlátunum. So gjørdist hann sjálvur ússaligur. Ein morgun kundi hann í sínum veikleika ikki arbeiða longur. Tveir vinmenn blivu sitandi hjá honum. Fyrrapartin segði hesin avmaktaði drongurin: „Í dag klokkan trý kemur Harrin og førir meg heim.“ Ein tími fyri og annar eftir fór. Ásettu tíðina hugdi Martin upp móti himli. Hann sá okkurt, sum var ósjónligt fyri báðar vinmenninar. At enda rætti hin doyggjandi seg upp, rætti armarnar út og rópti: „Harri, eg komi!“ So sakk hann niður aftur. Hann slapp nú at síggja tað, sum hann hevði boðað og trúð uppá.

*Effie Campbell* umsetti.

# Frásøgnin hjá Ellen Foss

Ellen Foss er leiðari hjá „Innfødt Evangelist Tjeneste hos Troens Bevis". Í dag hevur hon ábyrgdina av 1202 evangelistum, sum planta 6 nýggjar meinigheitir hvønn dag.

Næmingarnir í Bíbliuskúlanum Filadelfia í Kristiansand komu á vitjan hjá Troens Bevis. Áðrenn teir fóru avstað aftur, segði Ellen Foss næmingunum frá einari hending, sum hon hevði upplivað:

„Einaferð, tá ið eg slapp við til Kambodja til eitt átak, komu boð um eina konu, sum hevði verið seingjarliggjandi í 15 ár. Kundu vit koma og biðja fyri henni? Eg segði ja beinanvegin. Tá ið vit at enda komu fram eftir ein langan biltúr, bað eg fyri henni í 10 minuttir. Einki hendi, og einki hendi, og eg gjørdi meg til reiðar at fara. So fóru evangelistarnir undir at biðja. Teri bóðu í ein hálvan tíma, so rørdi hon tærnar. Tá ið ein tími var farin í bøn, fór hon á føtur.

Her í Noregi vilja vit hava alt at henda í skundi, vit hava ikki stundir at lata tað virka," endaði Ellen Foss.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Ein bygdarkona, sum búði í Havn, lá at doyggja. Hon lá við ongum viti. Maður hennara sat við songarstokkin. Tá hoyrir hann alt í einum, at hon lesur upp eitt vers, sum hon hevði lært sum ung:

***Djevel, du begærer af mig.***
***Jeg har dig slet intet at give,***
***tag du dit og pak du dig***
***til Helvedet evigt at blive.***
***Du har forspilt dit Himmerig.***

*e.c.*

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74